## Hann hevur valdið

1. Um alt er myrkt og dapurt,
trupulleikar herja á,
Himmalin, hann kennist stongdur,
ongan útveg tú kanst sjá.
Men tá finst ein leið at ganga
í og gjøgnum Jesu blóð.
Tú til hásætið fært atgongd,
Jesus valdar enn í dag.

Hann hevur valdið,
hann vil geva tær sína kraft.
Yvirflóð av gleði fært tú, áh, ja.
Hygg tí upp og óttast ei,
Jesus biður fyri tær,
hann er ei umbroyttur, nei, hann hevur valdið.

2. Jesus bar tína sjúku,
hann tók tína straff,
tá blóðið rann á krossi,
og hann knústi deyðans makt.
Tí hann Leyvan er av Juda,
Guds einborni Sonur er,
Kongur konga, Harri harra,
og hann valdar her í dag.

*Orð og lag: Gary Oliver*
*Umsett: Britt Rasmussen*

# Missiónsvika í THABOR

## 28. JAN. - 2. FEBR. 2025

## SAMAN VIÐ JESUSI



"...tá komu mangir tollarar og syndarar og settust til borðs saman við Jesusi og lærusveinum hansara." *Matt. 9,10.*

# Innbjóðing til missiónsviku

**Saman við Jesusi**
Í Bíbliuni lesa vit um fleiri støður, har orðini ”saman við Jesusi” standa. Í Matteus Evangeliinum stendur, at ”mangir tollarar og syndarar settust til borðs **saman við** Jesusi…”

Seinni í sama teksti spurdu farisearanir, ”Hví etur meistari tykkara **saman við** tollarum og syndarum?”

Aðrastaðni lesa vit, at ”tá ið kvøldið var komið, settist hann til borðs **saman við** teimum tólv lærusveinunum.”

Soleiðis fylgja vit Jesusi – hann var saman við menniskjum, og er tað enn.

Evnið á missiónsvikuni í ár er ”Saman við Jesusi”. Vit hava boðið pørum og einstaklingum á vitjan, har tey á hvør sín hátt vitna um sítt lív saman við Jesusi.

Á okkara døgum er tað enn líka viðkomandi at vera saman við Jesusi, sum tað var fyri 2000 árum síðani. Saman við Jesusi til arbeiðis, í lestrarørindum, í tænastu ella saman við Jesusi á fjalli ella í grind. Er nakar munur á okkara viðurskiftum við Jesus, tá vit hugsa um, hvar vit eru saman við honum ella hvat vit gera?

Verið hjartaliga vælkomin á missiónsviku!

**Stýrið fyri Thabor**

- **Thabor bjóðar drekkamunn eftir hvørt møti - tó verður døgurði hóskvøldið og nátturði sunnukvøldið.**
- **Á missiónsvikuni verður høvi at keypa bøkur og fløgur.**
- **Hálvan tíma undan hvørjum møti verður bønarløta í loftsstovuni.**
- **Gávur til Thabor kunnu latast á konto 9865-994.494.4.**

# Skráin fyri missiónsvikuna

**Týsdagur 28. januar kl. 19.30**
Henny og Jóhannus Mikkelsen, Toftir
Caritas, Leirvík
*Innsavning til Heimamissiónina*

**Mikudagur 29. januar kl. 19.30**
Martha og Tummas Pauli Mýri, Klaksvík
Cantus Deo, Fuglafjørður

**Hósdagur 30. januar kl. 17.30**
Familjumøti
Hildigerð og Pól á Sondum, Toftir
Barnakórið í Thabor
Thabor bjóðar døgurða eftir møtið

**Fríggjadagur 31. januar kl. 19.30**
Duruta og Ejvind Mouritsen, Argir
Taborkórið, Toftir

**Leygardagur 1. februar**
kl. 09.30 Morgunmatur og bíbliutími
Olga og Tórfríður Magnussen, Lamba

kl. 19.30
Beinta og Havstein Klein, Sandur
Gospelkórið í Thabor

**Sunnudagur 2. februar**
kl. 12.00 Guðstænasta
Gerhard Mikkelsen, Fuglafjørður

kl. 17.30
John Petersen, Kambsdalur
Manskórið í Thabor
*Innsavning til Thabor*